## GM skiftir stjóra

Amerikanska bilfyritøkan General Motors váttaði í nátt, at Rick Wagoner, stjóri og nevndarformaður, er farin frá eftir áheitan frá sjálvum Barrack Obama, forseta. Embætismenn í Hvítu Húsunum váttaðu í gjár, at Rick Wagoner fór at siga upp, eftir at Obama hevði niðið hann fara frá. Einki varð sagt um beinleiðis orsøkina til áheitanina, men keldur siga, at avgerðin var eitt lið í ætlanum forsetans at endurreisa tær báðar stóru bilfyritøkurnar GM og Chrysler, sum hava biðið stjórnina um 120 milliardir krónur afturat teimum 97 milliardunum, sum tær fingu í desember.



## Summarhús í útsølu

Tey, sum kundu hugsað sær at keypt eini summarhús í Danmark, eiga kanska at fara at hyggja seg um nú um páskirnar. Bara á Sælandi eru næstan 2.500 summarhús til sølu. Trekur marknaður hevur noytt eigararnar at skarva millum 25 og 30 prosent av tí upprunaliga prísinum, og fleiri meklarar siga, at talan er um útsølu. Ein teirra, Søren Mosbæk, sigur við Ritzau, at prísirnir á summarhúsum eru, sum teir vóru í 2004-2005. Ein annar meklari, Jørgen Larsen, sigur, at í meðal standa summarhús til sølu í 310 dagar, áðrenn tey verða seld.



# Bowlinghøllin yvirtekur Kaffivognin

**Kaffivognurin á Eystaru Bryggju hevur skift eigara, sum ætlar at fáa uttandura skonkiloyvi, ið millum annað skal tiltrekkja ferðafólk**

BÝARLÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Kaffivognurin á kaiini, ella Kaffistovan, sum hann hevur itið seinastu árið, hevur fingið nýggjan eigara. Fyritøkan handan bowlinghøllina á Hálsi fer framyvir at reka søguliga matstaðið í Havn.

Bjarni Kyster, leiðari í Bowlinghøllini, sigur við Sosialin, at tey keyptu staðið í síðstu viku, og at ætlanin er at peppa tað eitt sindur upp, sum hann sigur. Eitt nú við at søkja um skonkiloyvi, bæði innan- og uttandura.

-Tað koma nógv ferðafólk til landið, sum vit áttu at fingið meira burtur úr. Ikki minst stóru ferðamannaskipini áttu at givið meira, sigur hann, og samanber við lendingina í Hanstholm, har ein blá matstova á bryggjuni er fullsett av fólki, tá Norrøna kemur og fer .

Enn er ógreitt nær latið verður upp. Men so skjótt, sum skonkiloyvi er komið upp á pláss, sigur Bjarni Kyster, sum hevur góðar vónir um at fáa skonkiloyvi til staðið.

- Her er gott pláss at seta stólar og borð uttanfyri. Tað verður ikki parkerað heilt yvir, og við nøkrum blomsturkassum ber til at skerma fyri, sigur Bjarni Kyster, sum eisini ætlar at broyta matskránna, so hon verður léttari, til dømis við pizza og líknandi.

Tað verður sjónligt, at Bowlinghøllin verður eigari. Eitt nú við litum og stíli, umframt at høllin fer at lata matin til Kaffivognin, sum verður opin allan dagin og út á kvøldið.